Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Ingilín Didriksen Strøm, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Lýsingabløð hjá Posta

Spurningar:

1. Hvat heldur landsstýrismaðurin um at seta í verk eina skipan, har lýsingabløð hjá Posta einans verða borin út til tey, sum aktivt hava valt at fáa lýsingabløð ?
2. Hvussu nógv lýsingabløð verða borin út til hvørt húsarhald á hvørjum ári?
3. Hvussu nógv húsarhald hava valt "Ongar lýsingar – takk" skipanina hjá Posta?

Viðmerkingar:
Lýsingabløð verða hvørja viku borin út í húsarhald í Føroyum. Í dag skulu fólk sjálvi biðja um at fáa eitt klisturmerki við tekstinum "Ongar lýsingar – takk" á postkassan, um tey ikki vilja hava lýsingabløð. Hetta er ein sokallað "nei takk" skipan.

Fyri nøkrum árum síðani skeyt Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag upp, at lýsingabløð áttu at verið ein "ja takk" skipan í staðin fyri ein "nei takk" skipan.

Við eini slíkari broyting merkir tað, at sum útgangsstøði verða lýsingabløð ikki borin út til húsarhald, og tí skulu fólk aktivt velja at fáa lýsingabløð, um tey vilja hava tey. Grundarlagið fyri hesi broytingini er at minka um pappírsoyðsl, óneyðugt rusk og fyribyrgja, at fólk verða eggjað til at keypa meira, enn tey hava tørv á. Í 2019 vórðu 385.000 kilo av lýsingabløðum borin út til føroysk húsarhald.

Haraftrat eru lýsingabløðini tøk ókeypis á talgildum palli hjá Posta, sum eitur bera.fo. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 8. desember 2021

Ingilín Didriksen Strøm